# Uppiborin steypa

**TB megnaði ikki at gerast steypavinnari fjórða árið á rað, tí í finaluni leygardagin var Mjølnir betra liðið, og klaksvíkskvinnur vunnu uppiborið**

STEYPAFINALA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*




Karmarnir vóru av teimum bestu, tá ið kvinnuliðini hjá Mjølnir og TB fóru á vøllin í ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin at spæla steypafinalu. At tað eisini vóru júst hesi bæði lið, sum hittust í finaluni og harvið tóku nýggja gólvið hjá flogbóltssambandinum í nýtslu, var eisini ógvuliga hóskandi, tí hesi bæði liðini hava nú í nógv ár myndað oddin í føroyskum kvinnuflogbólti.

### Sterkir útlendingar

Tað er eingin ivi um, at Mjølnir hevur nakrar serstakliga royndar leikarar á liðnum, sum hava vunnið nógv bæði við Mjølnir og við føroyska landsliðnum. Her verður hugsað um leikarar so sum Marjun Kalsø, Veru Larsen, Margit G. Joensen, Tinu Jacobsen og Annu M. Jacobsen. Tilsamans hava hesar fimm ikki færri enn 210 landsdystir á baki, og slíkar royndir eru góðar at hava við sær í skjáttuni.

Tá ið so Mjølnir haraftrat hevur tveir sera sterkar útlendskar spælarar, Elisu Vasilieva Bogeva og Zakarinu Filipova, sum leygardagin báðar høvdu ein heilt góðan dag, so er tað ógvuliga trupult hjá mótstøðuliðunum at koppa Mjølnir.

Tann eina av teimum báðum útlendsku spælarunum hjá Mjølnir, Zaki, hevur annars verið burturstødd í eina tíð, og hon kom ikki aftur til Føroya fyrr enn dagin fyri finaluna. Hetta tóktist tó ikki ávirka hana nakað serligt, tí hon taldist avgjørt millum tær bestu á vøllinum.

Mjølnir fekk nógv tí bestu byrjanina upp á dystin, og tá ið móttøkan koyrdi so mikið væl, sum hon gjørdi leygardagin, var tað lagamanni at leggja upp til tær báðar útlendsku á kantunum.

Mjølnir rann eisini frá TB, og eina løtu høvdu teir annars ógvuliga sjónligu áskoðararnir hjá TB hug til at falla í fátt, men teir mentust aftur. Liðið úr Klaksvík legði seg á odda 17-8, men so tók TB eitt time-out, og hetta tóktist hjálpa um støðuna hjá suðuroyarliðnum.

TB megnaði nevnliga næstu løtuna at stríða seg upp á 17-15, og harvið kom eitt sindur av spenningi í aftur dystin.

Mjølnir svaraði tó aftur og kom á odda 24-20. Tá ið so TB ikki megnaði at fáa servuna hjá Veru yvir um netið aftur, var greitt, at fyrsta settið var farið til Mjølnir 25-20.

Mjølnir hevði vunnið settið greitt, og tað var hugvekjandi at eygleiða, hvussu einfalt álopsspælið hjá Mjølnir í veruleikanum var. Hvørja einastu ferð var lagt upp til útlendsku spælararnar á báðum kantunum hjá Mjølnir, og tað var lætt hjá teimum at langa í gólvið, tí blokkurin hjá TB virkaði als ikki í fyrsta settinum.

### Vánaligar hevingar

Í næsta settinum helt Mjølnir á við góða spælinum. TB hevði ómetaliga ringt við at fóta sær, og tað var sjón fyri søgn, at leikararnir hjá TB vóru skelkaðar av, at tað gekk so illa hjá teimum. Tær framdu eina rúgvu av óneyðugum feilum, og hevingarnar til kantarnar hjá teimum vóru alt ov óneyvar.

Mjølnir fekk tí eina framúr byrjan upp á settið, og tær løgdu seg eisini á odda bæði 7-0 og 9-2. Men so vann TB bóltin, og Gudrid Nolsøe, ið var komin heim úr Danmark at spæla finalu, servaði TB upp á 8-9, og so var spenningur aftur í settinum.

Síðani gekk tað javnt á, og liðini bæði skiftust um at hava leiðsluna. Men tá ið settið fór at nærkast endanum, setti Mjølnir aftur ferð á, og tær vunnu at enda settið við fýra bóltum, 25-21.

Nú hildu tey flestu, at dysturin mundi verða av-

---

Lena í Búð, Mjølnir:

## Vit trúðu upp á tað

Ein av týdningarmiklastu leikarunum hjá Mjølnir, Lena í Búð, var ovurfegin um steypasigurin á TB leygardagin.

Hon segði eftir finaluna, at tær vóru sera uppsettar til dystin. Tað eru nøkur ár síðani, at Mjølnir var í steypafinaluni hjá kvinnum, og tí vóru tær sera uppsettar, og tær skuldu bara vinna dystin, segði Lena. Hóast tað eru nøkur ár síðani, at Mjølnir var í finaluni, so hava tær flestu vunnið steypakappingina áður.

Spurd, um steypasigurin hevur nógv at siga fyri sjálvsálitið, nú farið verður undir seinastu dystirnar í landskappingini, sigur Lena:

– Tað veit eg ikki. Man plagar ofta at siga, at í fyrsta dystinum eftir steypafinaluna, er man eitt sindur sløvur, og tí kanska ikki er so klárur til dystin, sum man annars eigur at verða. Vit skulu spæla móti TB næstu ferð, og tá noyðast vit at hava lagt finaluna aftur um okkum og verða fullkomiliga klárar til tann dystin, segði Lena.



*– Vit skulu spæla móti TB næstu ferð, og tá noyðast vit at hava lagt finaluna aftur um okkum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*